Prixið er í ár skipað við fýra innleiðandi kappingum, har tveir bólkar koma víðari til eina hálvfinalu. Frá hálvfinaluni verða tríggir bólkar valdir til finaluna í Prixnum, sum verður partur av nýggja tiltakinum, Atlantic Music Event. Øll tey innleiðandi umførini verða í Fuglafirði, hálvfinalan verður á Tvøroyri og finalan í Norðurlandahúsinum í Havn.

**1. umfar, 4. feb. kl. 20.00**
Go Go Blues · Paradox
Dimmi · SIC · DejaVu
Lama Sea

**2. umfar, 12. februar**
Ph 5,5. · Side Effect
All that Rain · Makrel
Róp · MMM

**3. umfar, 26. februar**
Eyðun Nolsøe · Lawetz
ROK · Direct Level
Frostbit · India

**4. umfar, 5. mars**
Braquet
Kristleif Zachariasen
Synarchy · EGR2PLZ
Terji Rasmussen Band
onkikanndiskuterast.altkann

**Hálvfinala, 2. apríl**
Í hálvfinaluni verða tveir teir bestu bólkarnir frá hvørjum innleiðandi umfari. Burtur úr teimum átta bólkunum, skulu tríggir teir bestu veljast til finaluna.

**Finala, 23. apríl**
Finalan í Prixnum verður partur av galla-tiltakinum, sum verður kallað Atlantic Music Event. Tríggir bólkar kappast um endaliga sigurin í Prixnum. Umframt finaluna verða aðrar tónleikaframførslur eisini.

**Nýggir sangir**
Í øllum teimum innleiðandi umførunum verður spælitíðin í mesta lagi 20 minuttir og í minsta lagi 15 minuttir. Tveir triðingar av spælitíðini skulu bólkarnir spæla sangir, sum ikki eru givnir út áður.

**Ferðasamband**
Bussar koyra í sambandi við øll tey innleiðandi umførini í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Bussar koyra úr Vestmanna, Sundalagnum, Eiði, Toftum, Strondum og úr Havn. Harafturat siglir strandfaraskipið Sam úr Fuglafirði til Klaksvíkar eftir tær innleiðandi kappingarnar, um nóg stórur áhugi er fyri hesum Serlig atgongumerki til Prixið og ferðaseðil til Sam fáast á Kunningarstovuni í Klaksvík.

Á heimasíðuni hjá Prix Føroyum - www.prix.fo - eru fleiri upplýsingar um ferðasambandið.

# LØGINI SKULU VERA FANGANDI

**Limirnir í Braquet hava roynt fyrr og royna nú aftur. Men teir meta, at hetta er besta prixkapping nakrantíð, so kappingin er og verður hørð**



Braquet kom í finaluna í Prix Føroyum í fjør, og nú royna teir seg aftur í kappingini.
Mynd: Jens Kristian Vang

BRAQUET
*Dagfinn Olsen, dagfinn@sosialurin.fo*

Bólkurin Braquet sá dagsins ljós fyri umleið trimum árum síðani. So kom prixið og teir megnaðu at koma í finaluna.

Teir gjørdust seriøsir og eru tað framvegis.

- Talan er um harðan og progresivan rock, men tó sera melodiøsan tónleik, sigur Arni Zachariassen úr andaliga bólkinum Braquet.

## Á høgum støði

Limirnir í bólkinum vóna tað besta, men tora ikki at vænta tað heilt stóra, tí góð nøvn eru í komandi undanumfarinum. Og hóast Arni vísir á, at teir ikki eru vánaligir tónleikarar, heldur hinvegin, so er kappingin hørð.

- Vit hava t.d. nervar fyri kappingarneytunum Terja og Kristleifi, vísir hann á.

- Vit royna at hava tónleikin á høgum tekniskum støði. Men løgini skulu tó vera fangandi, tað leggja vit eisini dent á, sigur Arni.

## Góð undanumfør

Hann metir, at øll tey farnu undanumførini hava verið góð, og at nøvnini, sum fara á pall um vikuskiftið, eisini eru góð og borga fyri góðsku.

- Hetta er helst besta prixkappingin nakrantíð, sigur Arni Zachariassen.

Men um vónirnar hjá Braquet er hann meira varin við at úttala seg.

- Vit kunnu roknast sum ein rímuliga góður bólkur, sum hevur verið í finaluni áður. - Men eg vænti, at um vit koma víðari hesaferð, so verður tað við tað, tí eg tori ikki at vænta, at vit koma í sjálva finaluna, sigur hann lítillátin.

## Dømingin

Eisini Arni hevur eina meting um prátið um dømingina. Hann metir, at dómararnir døma rætt, mett eftir teimum treytum ið teir ganga eftir.

- Men kanska skuldi heldur verið hugt eftir hesum punktum, ið teir hava at hyggja eftir og halda seg til, men sum nú er døma teir rætt.

- Men harvið er ikki sagt, at coolasti bólkurin kemur víðari og at spæla fyri útlendingum. Tað er ikki nýhugsan, ið verður løgd fyri útlendingar. Ein kann siga, at danir hava Kim Larsen, sum ikki hevur sligið ígjøgnum um allan heim, tí hann hoyrir heima í Danmark. Frændur hoyra til sammetingar heima í Føroyum. Tað er eitt sindur keðiligt, at tað coolasta ikki fær møguleikan og verður víst fram, metir Arni Zachariassen úr Braquet.

# FØSTUFRESSAR HAVA ÚR AT GERA

**Rógvi á Rógvu og Arnold Ludvig skulu leygarkvøldið spæla við tveimum bólkum í seinasta innleiðandi umfarinum í Prixnum, og teir eru longu komnir í finaluna við einum triðja bólki**



Arnold Ludvig og Rógvi á Rógvu spæla ávíkavist bass og trummur í trimum Prix-bólkum í ár

FØSTUFRESSAR
*Eyðun Klakstein, eydun@sosialurin.fo*

Rógvi á Rógvu og Arnold Ludvig eru tveir væl umtóktir og nógv umbidnir tónleikarar.

Teir báðir løgdu botnin hjá tí tiltikna bólkinum Føstufressar, og teir hava bæði áðrenn og aftan á verið sera virknir í føroyskum tónleikalívi.

Tað eru teir eisini í ársins Prix Føroyar tónleikakapping. Rógvi á Rógvu spælir trummur í trimum ymiskum bólkum, og Arnold Ludvig spælir bass í somu trimum bólkum.

Í fyrsta umfari av Prixnum spældu teir saman við Una Debess í bólkinum GoGo Blues, og tað eydnaðist teimum at koma í hálvfinaluna við væl spældum og kensluríkum bluestónleiki.

## Stuðla solisti

Leygarkvøldið skulu Rógvi og Arnold aftur á pallin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, og teir skulu spæla við tveimum bólkum hetta umfarið.

Teir spæla við hjá Kristleif Zachariasen, sum kom fram sum solistur, men sum nú hevur bólk afturat sær. Samstarvið millum Kristleif og teir báðar føstufressarnar byrjaði av álvara, tá ið Kristleif tók sína fløgu upp – Litleysir blettir.

Og samstarvið heldur fram í Prixnum, og umframt teir tríggjar spæla eisini Heðin Ziska Davidsen og Óli Olsen í bólkinum leygarkvøldið.

## Fýra fressar

Tá ið Terji Rasmussen fer á pallin við sínum bólki verða ikki færri enn fýra av teimum gomlu Føstufressunum á pallinum samstundis.

Tá fara Rógvi á Rógvu og Arnold Ludvig aftur at leggja botn til sangirnar hjá Terja, og afturat teimum spælir eisini Magnus Johannesen ljómborð. Seinasti tónleikarin í bólkinum er Hjalti Joensen, sum Terji áður hevur nógv samstarv.

Slatur gongur um, at skuldi Terji Rasmussen komið víðari í kappingini, so verður tað møguliga eitt reinur Føstufressa-bólkur, sum skal spæla í hálvfinaluni á Tvøroyi. Livst, so spyrst.

Ein spurningur, sum verður svaraður leygarkvøldið, er, um Rógvi á Rógvu og Arnold Ludvig skulu spæla í meira enn einum bólki í hálvfinaluni.